# Allir fordómar eru gjørdir til skammar

**Tað var heppið, at Almanna- og heilsuskúlin varð lagdur í Suðuroy, sigur ein av næmingunum, Hildigarð Djurhuus, úr Fuglafirði**

ØKISMENNING
*Áki Bertholdsen*

– At fara til Suðuroyar at ganga í skúla er onki at stúra fyri.

Hildigarð Djurhuus úr Fuglafirði er ein av næmingunum, sum júst hevur tikið prógv á nýggja Almanna- og Heilsuskúlanum í Suðuroy.

Og hon heldur, at tað hevur bara verið ein fyrimunur, at skúlin er í Suðuroy og ikki í miðstaðarøkinum.

Tá ið tað varð gjørt av, at skúlin skuldi vera í Suðuroy, og ikki í Havn, varð eitt ramaskríggj. Bæði politikarar og fakfólk vóru fullvís í, at hetta fór at forkoma skúlanum. Skúlin mátti liggja í Havn, tí tað var avgerandi, at hann var tætt við Sjúkrasystraskúlan og Landssjúkrahúsið. Tey vístu eisini á, at teir flestu av næmingunum vóru tilkomnar konur og tær fóru aldrin at hætta sær heilt til Suðuroyar at ganga í skúla.



*– Tað er onki at stúra fyri at fara til Suðuroyar at ganga í skúla. Tvørturímóti hava tað verið nógvir fyrimunir av, at skúlin ikki hevur verið í miðstaðarøkinum, sigur Hildigarð Djurhuus úr Fulgafirði, nýklaktur heilsuhjálpari av skúlanum í Suðuroy*

Nú er útbúgvingin roynd í verki, tí fríggjadagin fingu teir fyrstu næmingarnir prógv.

Tískil kundi tað verið hóskandi at biðið eina av hesum tilkomu konunum um eina eftirmeting.

Og eftirmetingin er púra greið.

– Eg kann beinanvegin siga, at allir fordómar eru so púrasta gjørdir til skammar, sigur Hildigarð Djurhuus, nýklaktur heilsurøktari av skúlanum í Suðuroy.

Hon leggur afturat, at í hesum mál talar hon ikki bara fyri seg sjálva.

– Hetta eru vit allar púra samdar um, sigur hon.

Hon sigur, at tað hevur verið bæði læruríkt og spennandi at ganga í skúla.

– Hóast eg havi arbeitt í nógv ár, hava vit nú fingið eina aðra barlast.

Hon heldur eisini, at tað var stuttligt og nakað serligt at vera í tí fyrsta flokkinum, sum fekk hesa útbúgving í Føroyum.

– Vit hava eisini havt avbera góðar lærarakreftir og vit eru eru sera væl nøgdar við tíðina í Suðuroy.

**Væl móttikin**

Hildigarð Djurhuus sigur eisini, at tey hava verið sera væl móttikin í Suðuroy.

Næmingarnir hava búð í ymsum húsum, sum skjótt fingu navn: Eysturoyarhúsið var í Trongisvági, Sandoyar- og Klaksvíkarhúsið var í Froðba og Vágahúsið var í Válinum.

– Vit hava følt okkum sera vælkomin og suðuroyingar hava verið sera blíðir.

Hon sigur, at nógv varð tosað um, at tað var onki skúlaumhvørv í Suðuroy, men tað er ikki rætt. Vit hava skapt okkara egna skúlaumhvørvið og vit hava eisini eitt røktarfakligt umhvørvið at kalla í túnin um, tí bæði sambýli, ellis- og røktarheim og sjúkrahús er beint við, umframt at sambýli eisini er í Vági.

– Eg haldi, at tað hevur riggað sera væl.

Men tað besta við, at skúlin er í Suðuroy hevur í veruleikanum verið, at tær ikki eru slopnar heim hvørt kvøld.

– Tað hevur skapt eitt sera sterkt sosialt samband ímillum okkum, sum vit ikki høvdu fingið, um skúlin var í Havn og vit fóru til húsar, hvør í sína ætt, hvønn dag eftir skúlatíð.

– Eg vil ikki siga, at hetta hevur verið so øgiliga strævið. Men hetta er ikki ein útbúgving, sum tilkomnar konur ikki koma sovandi til.

– At vit hava verið so staðbundnar, hevur eisini gjørt, at vit hava kunnað hugsavnað okkum 100% um skúlagongdina.

– Vit eru allar tilkomnar og at ganga í skúla í okkara aldri, krevur meir, enn tað krevur av yngri fólki. Tí hevur tað verið heppið fyri skúlagongdina, at vit ikki eru slopnar heim, hvørt kvøld, tí so hevði skúla gongdin ikki verið tann sama. Tað hevur eisini ein ávísan týdning at koma burtur úr tí dagliga eina tíð, sigur Hildigarð Djurhuus.

– Eg vil tí eina og hvørja tíð mæla øllum til at fara á hendan skúlan, sigur hon.

# B 6: Uppsøgnirnar verða ikki tiknar aftur

**Leiðarin á Landssjúkrahúsinum sigur, at tað verða ikki fleiri sjúkrasystrar settar á B 6. So koma vit ikki aftur, sigur Ingun Gaardbo, álitisfólk**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
*Áki Bertholdsen*

Á miðdegi í gjár var onki, sum bendi á, at ein loysn fór at verða funnin á kreppuni á B 6 á Landssjúkrahúsinum..

Tvørturímóti.

Kravið frá einum 19 sjúkrasystrunum, sum hava sagt upp, hevur verið, at fleiri starvsfólk verða sett.

Men hesum vísir Jóanes Erik Køttlum, leiðari á Landssjúkrahúsinum aftur aðrastaðni í blaðnum í dag. Tað sama verður endurtikið í einum tíðindaskrivi, sum leiðslan á Landssjúkrahúsinum almannakunngjørdi beint fyri miðdag í gjár.

Har verður sagt, at tað er onki, sum talar fyri at seta fleiri fólk á B 6.

– Ingun Gaardbo sigur púra greitt, at verða ikki fleiri fólk sett, standa uppsagnirnar við og so koma vit ikki aftur.



*Á miðdegi í gjár røktist onki fyri eini loysn á kreppuni á B 6 á Landssjúkrahúsinum, tvørturímóti*

Leiðslan á Landssjúkrahúsinum vísir í tíðindaskrivinum á fleiri tiltøk, sum eru sett í verk fyri at bøta um umstøðurnar á B 6.

– Tað er rætt, at fleiri tiltøk eru sett á eitt pappír. Men tey eru aldrin sett í verk á deildini, sigur Ingun Gaardbo í eini stuttari viðmerking, beint áðrenn blaðið fór til prentingar

Eitt nú er seingjatalið sett niður í 18, men tað hjálpir lítið, tá ið sjúklingar liggja á gongini.

Leiðslan á Landssjúkrahúsinum vísir eisini á, at á B 6 hava tey 0,91 starvsfólk fyri hvørja song á deildini. Í Danmark hava tey 0,8.

–Hetta er ikki rætt. Nógva staðni í Danmark hava tey 1,1 starvsfólk fyri hvørja song.

Tað ber heldur ikki til at samanbera viðurskiftini, tí í Føroyum er stórt trot á røktarheimsplássum og døgnrøktarskipan og tí liggja nógv fólk á B 6, sum av røttum ikki hoyra heima her. Tann, sum hevur verið longst á B 6, hevur ligið har í hálvttriðja ár.

– Tí er arbeiðið hjá okkum nógv tyngri og kann tí á ongan hátt samanberast við eitt danskt sjúkrahús,tí har eru heilt aðrar umstøður.

Í Danmark betalir kommunan eisini, hvørja ferð, ein røktarsjúklingur liggur á sjúkrahúsi.

– Tað nyttar onki at seta tøl upp, uttan at hyggja eftir veruleikanum. Vit kunnu hava 30 sjúklingar og tað er nóg mikið við fýra fólkum. Vit kunnu eisini hava 15 sjúklingar og tað er ikki nóg mikið við seks fólkum.

Á Landssjúkrahúsinum er arbeiðsbyrðan nógvar ferðir tyngri enn á einum donskum sjúkrahúsi, tí sjúklingarnir krevja meiri røkt, sigur Ingun Gaardbo.



# Halda fram við yvirtøkuni

**Yvirtøkan av flogvøllinum er ikki steðgað, men verður útsett, til loftferðslumynduglei kin eisini er komin á føroyskar hendur, sigur løgmaður**

LOFTFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Yvirtøkan av loftferðslumyndugleikanum eigur at verða gjørd, áðrenn sjálvur flogvøllurin verður yvirtikin, sigur løgmaður. Tí er yvirtøkan av vøllinum, sum skuldi vera á nýggjárinum, útsett.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, sigur, at tað hevur einki við nakað valúrslit ella valagn at gera, at nú er gjørt av at útseta yvirtøkuna av flogvøllinum, sum ætlandi skuldi verða framd á nýggjárinum.

Men hann ásannar, at orðini hjá flogvallarstjóranum um, at danir ikki vilja byggja út orsakað av fullveldispolitikkinum hjá landstýrinum, hava havt árin.



*Yvirtøka av flogvølli og loftferðslumyndugleika eiga at hanga saman, sigur løgmaður. Tí verður flogvøllurin í Vágum ikki yvirtikin, fyrr enn føroyingar hava fingið loftferðslumyndugleikan á føroyskar hendur*

Løgmaður sigur, at hann hevur fingið at vita frá donskum myndugleikum, at tað er ikki Ferðslumálaráðið, sum samráðst annars hevur verið við, men Forsætismálaráðið, sum tekur avgerðir, tá talan er um pengar til flogvøllin.

Flogvøllurin í Vágum verður rikin við fleiri undantaksloyvum frá donsku loftferðslumyndugleikunum, sigur løgmaður.

Tí metir hann tað skilabest at bíða við at yvirtaka sjálvan vøllin, til myndugleikin yvir honum eisini er yvirtikin.

–Tí tað kann ikki væntast, at loftferðslumyndugleikarnir fara at lata nøkur undantaksloyvi, tá teir vita, at føroyingar skulu gjalda tær kravdu útbyggingarnar.

Tað kann gott vera, at tað tykist løgið at tosa um at yvirtaka ein flogvøll, sum vit samstundis krevja, at danir byggja út og gjalda fyri.

Men tað er einki løgið í tí, vísir løgmaður á, tí tær útbyggingarnar skuldu langt síðan havt veirð gjørdar, men eru beinlieðis forsømdar. Og har er tað so, at undantaksloyvini koma inn í myndina.

Tann sum í løtuni eigur flogvøllin, hevur sjálvur myndugleikan, og so kann ymist gerast, sum eitt nú at víkja frá altjóða krøvum við at lata sær sjálvum undantaksloyvi.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, sigur, at tað ber ikki til at yvirtaka flogvøllin í Vágum, uttan at loftferðslumyndugleikin eisini samstundis verður yvirtikin.

At yvirtaka loftferðslumyndugleikan er ikki nakað, sum gjørt verður eftir einum degi. Og eftir ætlan skal tann vyritøkan ikki verða fyrr enn fyrsta januar 2004.

So tað liggur nakað væl frammi í tíðini við yvirtøku av flogvøllinum, sigur løgmaður.

Men tað merkir kortini ikki, at flogvøllurin ikki skal byggjast út. Tí tað skal hann.

Hvussu verður við kostnaðinum av tí, heldur løgmaður ikki nakað vera at ivast í. Hann eiga danir at bera, tí tað skuldi langt síðan havt verið gjørt.

# Tvey skip til Sørvágs



*Sardis hevur skift eigara, navn og nummar. Hann eitur nú Dragasund og er merktur VA 361. Systurskipið Topas eitur nú Akranes VA 261*

*Mynd: Edvard Joensen*

**P/F Vesturvón hevur keypt partrolararnar Sardis og Topas frá Snaraløki í Runavík. Skipini hava skift navn og eita nú Akranes og Dragasund**

SKIPAKEYP
*Edvard Joensen*

Nú Vesturvón hevur keypt Sardis og Topas, eru fimm skip í reiðarínum. Umframt flaggskipið, Vesturvón, eigur felagið eisini trolaraparið Akraborg og Varborg. Prísin fyri hesi bæði skipini, sum nú eru keypt, vil stjórin á Vesturvón ikki upplýsa.

Ólavur Petersen, stjóri á Vesturvón, sigur, at skipini fara at fiska undir Føroyum, sum tey áður hava gjørt. Tey fara í so stóran mun sum gjørligt, sigur hann, at landa í Sørvági.

Vesturvón eigur flakavirkið í Sørvági, sum felagið Vestís Seafood rekur, og vónar Ólavur Petersen, at hesi bæði skipini, sum komin eru afturat, kunnu spjaða eitt sindur til har eisini.

Skipini bæði, sum Vesturvón nú hevur keypt, eru nevnd eftir støðum við fjarðarmunnan. Sardis eitur nú Dragasund, sum er fyri sunnan, meðan Topas nú eitur Akranes, sum liggur norðantil uttanvert Bíggjar bygd.

Um restina av flotanum sigur Ólavur Petersen, at Vesturvón í løtuni er í Barentshavinum. Hann hevði 137 tons inni sunnukvøldið og verður væntandi heima til jóla. Nú er kvotan eisini við at vera uppi, sigur Ólavur Petersen.

Hann vónar, at tað fer at bera til at fáa eina líkinda avtalu um svartkjaftin komandi ár, so vit hava nakað at býta um við russar. Tí svartkjafturin er lívsneyðugur fyri trolararnar eystan fyri, sigur hann.

Í aðrar mátar verður komandi ár sum vanligt hjá Vesturvón. Tað verður at fara eystureftir, eins og kongafiskurin í Irmingarhavinum og svartkalvi undir Grønlandi verða tað, farið verður eftir.

Tær báðar smáu borgirnar, Akraborg og Varborg, hava í ár fiska fyri einar 12 milliónir, sigur Ólavur Petersen, sum er nøgdur við tað. Tær hava verið til umvælingar stóran part av november mánaða, sigur hann.

# Loddrøtt lygn

**Tað er loddrøtt lygn, tá Sosialurin skrivar, at Heini O. Heinesen ikki fær blaðrúmd í Fregnum, sigur ábyrgdarblaðstjórin á blaðnum**

AVSANNAN
*Edvard Joensen*

Tað er loddrøtt lygn, sum stóð á forsíðuni á Sosialinum leygardagin, at Heini O. Heinesen ikki fær blaðrúmd í Fregnum, sigur Jonhard Mikkelsen, ábyrgdarblaðstjóri á Fregnum.

Heini O. Heinesen hevur ongantíð vent sær til blaðið við nøkrum tilfari, og blaðið hevur heldur ongantíð havt nakra samrøðu við hann. Bara tosað við hann um mál, hann veit nógv um, sigur ábyrgdarstjórin.

Um samrøðurnar, Heini O. Heinesen nevnir í Sosialinum, sigur blaðstjórin, at Fregnir alla ta tíð, blaðið er komið út, bert hevur tosað við Heina O. Heinesen tvær ferðir.

Tað var við tí endamáli at fáa bakgrundsvitan um mál, sum Heini er væl inni í. Mett var ikki, at tað var nøkur grund til at endurgeva keldurnar í slíkum føri, sigur hann.

Fregnir koyrir ongan út ella hevur ikki skilt tilfar frá, sum sent er blaðnum, sigur ábyrgdarstjórin.

Jonhard Mikkelsen sigur, at Fregnir ongantíð hevur fingið nakað tilfar frá Heina O. Heinesen at seta í blaðið yvirhøvur. Tað er grundin til, at hann ikki hevur verið í blaðnum.

–At fryst tann garpin úti var tað seinasta, eg hevði gjørt, sigur Jonhard Mikkelsen í viðmerking við Sosialin.